Álit

í

løgtingsmáli nr. 65/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp
(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar o.fl., broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar og aðrar smærri broytingar)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 13. februar 2024 og eftir 1. viðgerð 22. februar 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 26. februar og 7. mars 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetrinum, Vinnuhúsið, Landsfelag pensjónista, Føroysk Miðlafólk, leiðslu og stýri í Kringvarpi Føroya og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Kringvarp Føroya er í eini fíggjarligari trongstøðu og hetta skal bøtast uppá við hesum uppskoti, sum hevur til endamáls at fáa Kringvarp Føroya aftur í fíggjarliga javnvág.

Høvuðsorsøkin til fíggjarliga sperdu støðuna er, at kringvarpsgjaldið hvørki er javnað ella hækkað síðan umleggingina av gjaldinum í 2015. Somu tíð eru bæði lønir, prísir og annað vaksið støðugt.

Javningin stóð upprunaliga í lógaruppskotinum í 2015 sum fastur prosentsatsur (lm. 26/2015), og har ætlanin var, at gjaldið seinni skuldi javnast saman við almennu javningini. Fasta javningin varð tó tikin úr aftur, tí mann heldur vildi bíða eftir, at ein almennur javningarfrymil var blivin veruleiki.

Í hesum uppskoti er lagt upp til, at mánaðarliga kringvarpsgjaldið verður hækkað við 13 krónum fyri likamligar persónar og árlig javning av hesum gjaldinum uppá tvey prosent verður sett inn í lógina. Hinvegin verður kringvarpsgjaldið fyri smærri stovnar og virki lækkað við 500 krónum um árið. Við uppskotinum fær Kringvarpið eina árliga meirinntøku netto, ið hevði svarað til 5,3 mió. kr. fyri fult ár í 2024 og sum verður 6,6 mió. kr. í 2025.

Hóast tað er eitt munagott íkast til ta upphædd, sum Kringvarpinum tørvar, so er tað ein sannroynd, at tað ikki er nóg mikið, tí Kringvarpið fer eftir øllum at døma at hava eitt hall uppá umleið 8,8 mió. kr. í ár við verandi lóggávu.

Meirilutin heldur ikki, at vit kunnu liva við einum public-service stovni, sum, í ein ávísan mun í øllum førum, ikki kann liva upp til tær public-service skyldur, sum stovninum eru álagdar, og tí mælir meirilutin til, at mánaðarliga gjaldið fyri likamligar persónar hækkar við 20 krónum heldur

enn 13 krónum. Tað merkir, at mánaðarliga kringvarpsgjaldið hjá fólki frá 24 árum og upp til fólkapensjónsaldur verður 170 krónur, tá lógin er samtykt, og at fólkapensjonistar skulu rinda 70 krónur um mánaðin.

Meirinntøkan av hesi broytingini verður tað, ið hevði svarað til góðar 3,1 mió. kr. fyri fult ár í 2024, og sum svarar til góðar 3,2 mió. kr. í meirinntøku í 2025, so at samlaða upphæddin, ið Kringvarpið fær av hesi lógarbroyting, fer frá tí, ið hevði svarað til 5,3 mió. kr. fyri fult ár í 2024 upp á knappar 8,5 mió. kr., sum er umleið á støði við hallið, ið Kringvarpið annars væntandi fer at hava, og sum fer at svara til góðar 8,7 mió. kr. í meirinntøku í 2025.

Undir fyrstu viðgerð undraðust fleiri løgtingsfólk á, at mann ikki byrjar at rinda kringvarpsgjald fyrrenn um 24 ára aldur. Vanliga byrjar mann at rinda slík gjøld um 18 ára aldur.

24 ára aldursmarkið varð upprunaliga ásett, tí mann millum annað ikki vildi, at eitt húski skuldi rinda fleiri gjøld, og tí skuldu tey undir 24 ára aldur ikki rinda.

Eitt sambæriligt gjald við kringvarpsgjaldið er heilsutrygdargjaldið. Har rindar mann eitt fast grundgjald, tá mann er 18 ára gamal. Har verður atlit ikki tikið at tali av fólki í einum húski. Yvirskipað byrjar mann at rinda almenn gjøld, tá mann er fyltur 18 og arbeiðsmarknaðargjøld sum til dømis barsilsgjald og ALS-gjald, tá mann er fyltur 16.

Politisk undirtøka hevur tó ikki verið fyri at lækka aldursmarkið fyri, nær mann byrjar at rinda kringvarpsgjald, og tí verður tað verandi 24 ár.

At lagt verður upp til, at smáar vinnufyritøkur eisini fáa eina lækking í gjaldinum, heldur meirlutin verða rætt. Hetta hevur verið umrøtt í fleiri ár og broytist nú. Serliga eru tað tær heilt smáu fyritøkurnar, ofta bara eitt einstakt fólk ella tvey, sum fáa ágóðan av broytingini.

Sambært svari til § 52 a fyrispurning í fjør summar (52-129/2022: Kringvarpsgjald hjá vinnufyritøkum) rinda 1.523 virkir kringvarpsgjald. Lækkingin í gjaldinum fyri smáar vinnufyritøkur kemur umleið helvtini av hesum virkjunum til góðar. Sparingin fyri hvørt einstakt av hesum virkjunum verður 500 kr. um árið. Tey, sum í dag rinda kr. 3.500 um árið, fara frameftir at rinda kr. 3.000 og tey, sum í dag rinda kr. 2.000 um árið, fara frameftir at rinda kr. 1.500.

Landsfelag Pensjónista hevur fýlst á, at gjaldið hjá pensjonistum hækkar líka nógv sum hjá restini. Sagt verður, at gjaldið hjá pensjonistum hækkar lutfalsliga meira enn hjá restini, og tað er rætt, men í krónum er hækkingin í upphæddini tann sama, og pensjonistar varðveita sína serskipan í eini annars generellari gjaldsskipan og rinda framvegis ikki nógv meira enn ein triðing av kringvarpsgjaldinum. Tí verður hildið fast í hækkingini, sum hon er ásett í uppskotinum.

Tað varð nevnt undir fyrstu viðgerð, at størru fyritøkurnar áttu at rinda meira, og fleiri hoyringarsvar vístu somuleiðis á, at tað kann verða ein máti at fáa meira pengar inn.

Vinnuhúsið undrast á, hví virki yvirhøvur rinda kringvarpsgjald, tá onnur lond eru farin frá tí. Meirilutin heldur, at spurningurin, um virki skulu rinda kringvarpsgjald ella ikki, er ein størri spurningur, sum annars ikki verður viðgjørdur í hesi broytingarlógini. Verandi leistur er ein týðandi partur av upphæddini, sum verður tikin inn og kann ikki broytast uttan víðari. Tí krevur tað eina politiska viðgerð í sær sjálvum.

Skuldu virkir ikki longur goldið kringvarpsgjald, hevði tað eisini havt við sær, at einstaklingar mugu rinda eitt munandi hægri gjald fyri at viga upp ímóti hesum.

Meirilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í innganginum til § 1 verður "nr. 91 frá 21. desember 2004" broytt til: "nr. 61 frá 16. mai 2006".

2. Í § 1, nr. 4 verður í § 7, stk. 1, 1. pkt. "kr. 163,00" broytt til: "kr. 170,00".

3. Í § 1, nr. 4 verður í § 7, stk. 2, 1. pkt. "kr. 63,00" broytt til: "kr. 70,00".

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Í innganginum til § 1 í lógaruppskotinum verður víst til løgtingslóg nr. 91 frá 21. desember 2004, sum er ein áður galdandi broytingarlóg til løgtingslóg um kringvarp. Galdandi løgtingslóg um kringvarp er nr. 61 frá 16. mai 2006 við seinni broytingum. Við hesum broytingaruppskoti verður sostatt víst til galdandi løgtingslóg um kringvarp.

Til nr. 2 og 3:
Í uppskotinum frá landsstýriskvinnuni verður skotið upp at hækka kringvarpsgjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka kringvarpsgjaldið úr kr. 50,00 um mánaðin upp í kr. 63,00 um mánaðin. Við hesum broytingaruppskoti verður kringvarpsgjaldið hækkað til kr. 170,00 um mánaðin og hjá fólki í fólkapensjónsaldri til kr. 70,00 um mánaðin.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein minniluti (Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at bera so í bandi at fáa Kringvarpið aftur í fíggjarliga javnvág og at tryggja inntøkugrundarlagið móti árligum prísvøkstri. Eisini er eitt av endamálunum at lækka gjaldskyldugu upphæddina hjá smærri virkjum og stovnum. Hesum tekur hesin minnilutin undir við.

Høvuðsorsøkin til fíggjarliga sperdu støðuna er, at kringvarpsgjaldið hvørki er javnað ella hækkað síðan umleggingina av gjaldinum í 2015. Somu tíð eru bæði lønir, prísir og annað vaksið støðugt.

Í uppskotinum er lagt upp til, at mánaðarliga kringvarpsgjaldið verður hækkað við 13 krónum fyri likamligar persónar, og ein javning av gjaldinum uppá tvey prosent um árið verður sett inn í lógina.

Við tí fær Kringvarpið eina meirinntøku netto, ið hevði svarað til 5,3 mió. kr. fyri fult ár í 2024 og sum verður 6,6 mió. kr. í 2025 umframt eina árliga javning av gjaldinum frá 2025 at rokna.

Hesin minnilutin metir, at tað er rætt at gera hesa broyting við at hækka gjaldið fyri likamligar persónar, og at javning av gjaldinum verður sett inn í lógina. Orsøkin er, at verður hetta ikki gjørt, so merkir tað eina niðurlaðing av Kringvarpinum, og tí tekur hesin minnilutin ikki undir við.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Bárður á Lakjuni) hevur hesa viðmerkingar:

Hesin minnilutin fegnast um, at gjaldskylduga upphæddin hjá smærri stovnum og virkjum lækkar við 500 kr. Hesin minnilutin metir eisini, at tað er rætt, at kringvarpsgjaldið verður javnað við 2% um árið frá 2025 at rokna. Tó mælir hesin minnilutin til, at kringvarpsgjaldið ikki verður hækkað við 13 krónum í einum fyri likamligar persónar, men at útgangsstøðið verður tað gjaldið, ið er galdandi í dag, nevniliga ávikavist 150 kr. um mánaðinum fyri tey í aldrinum 24 ár og fram til fólkapensjónsaldur, og at tað verður verandi á 50 kr. um mánaðin fyri persónar í fólkapensjónsaldri.

Hesin minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: “(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar o.fl. og aðrar smærri broytingar)”

2. Í § 1, nr. 4 verður í § 7, stk. 1, 1. pkt. “kr. 163,00” broytt til: “kr. 150,00”.

3. Í § 1, nr. 4 verður í § 7, stk. 2, 1. pkt. “kr. 63,00” broytt til: “kr. 50,00”.

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Hetta verður tikið úr frágreiðandi heitinum: “broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar”.

Til nr. 2 og 3:
Í uppskotinum frá landsstýriskvinnuni verður skotið upp at hækka kringvarpsgjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka kringvarpsgjaldið úr kr. 50,00 um mánaðin upp í kr. 63,00 um mánaðin. Við hesum broytingaruppskoti verður kringvarpsgjaldið verandi óbroytt á ávikavist kr. 150 og kr. 50 um mánaðin fyri síðani at verða javnað við 2% um árið frá 2025 at rokna.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 22. mars 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	